

Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

## Hitler – eitt eindømi

*Sebastian Haffner, Ammerkungen zu Hitler,*
*Umsett: Christian Kock, Adolf Hitler – et politisk portræt,*
*GB Forlagene, 2005*

Nú um dagarnar kappast bæði søgufrøðingar og ummælarar um at hálova endurútgávuni av ævisøguni *Adolf Hitler - et politisk portræt* eftir Sebastian Haffner.

Sjálvt um bókin kom út fyrstu ferð fyri á leið 30 árum síðani, er tað onki sum bendir á, at hon er minni aktuell. Heldur enn at síggja Hitler, sum eitt úrslit av søguni, er portrettið ein greining av persónsmenskuni hjá Hitler. Sambært Haffner vóru tað sermerktu persónligu eginleikarnir hjá Hitler sum vórðu avgerðandi fyri, hví hansara leiklutur fekk tær avleiðingar, tær fingu.

Í einum ummæli vísir Tøger Seidenfaden á, at Hitler er eitt negativt dømi um, at einstøk menniskju í allar størstan mun kunnu avgera søgunnar gongd. Harvið er kjarnin í bókini, at søgan á ongan hátt fylgir eini fastlagdari ætlan ella letur seg spáa um, men allatíðina verður skapað av felags og einstøkum valum.

Søgan endurtekur seg ikki, og Hitler var eitt eindømi. Kortini heldur Seidenfaden endurútgávuna vera sera hóskandi. Okkara tørvur á at skilja ta nazistisku vanlukkuna er ikki vorðin minni, nú nationalpopulisman í breiðastu merking aftur spælir ein týðandi leiklut í europeiskum politikki. Og lýsingin av Hitler minnir okkum á ein óhugnaligan hátt á, at tað sjáldan ber til at spáa um úrslitið.



Ummæli:

# Føroyar sum sinnisstøða

**Sum skaldsøga eydnast Buzz Aldrin, hvor ble det av deg i alt mylderet? eftir norska høvundan Johan Harstad, best, har hon verður ein lýsing av Føroyum sum lemjandi sinnisstøða**

*Anna V. Ellingsgaard*

*Johan Harstad, Buzz Aldrin, hvor ble det av deg i alt mylderet?, Gyldendal, 2005*



*Norska skaldsøgan hjá Jan Harstad er skipað í fýra kapitlar hvør við eini føroyskari mynd og enskari yvirskrift*

30 ára gamli norðmaðurin Mattias, sum hevur mist alt heima í Stavanger, er komin til Føroyar saman við einum rockbólki, sum skal spæla á eini konsert á Ólavsøku. Hvat hendi umborð á Norrønu er ógreitt, men næstu løtu raknar Mattias við í oysregni onkustaðni á Hvítanesvegnum, uttan hóming av, hvar hann er staddur, ella av hvat hann ger har. Hann fer til gongu, og útlúgvaður sovnar hann til endan í busskýlinum í Kollafirði. Har vekir ein Havstein Garðalíð Mattias, og tekur hann við sær til Gjógv, til ein vardan útslúsingarstovn fyri sinnisveik, har Havstein er leiðari.

### Ósjónligi tveyarin

Mattias gerst partur av búfelagsskapinum við Gjógv, og skaldsøgan verður í stóran mun søgan um lívið og tey fimm, sum húsast har, hvør við síni heldur døkku søgu.

Myndaliga er skaldsøgan nakað óbúgvin, men málsliga hevur Johan Harstad eitt serligt hegni til at geva sínum søgum lív, hóast tær sýnast nakað tilvildarligar. Tørvar høvundanum eina nýggja vend í søgugongdini, letur hann bara enn ein outsidara flyta inn á stovnin við Gjógv, uttan at tykjast at hava stórvegis endamál við tí.

Í grundini er tað ikki sørt imponerandi, at tað eydnast Harstad at skapa eina so mikið hugtakandi søgu, sum *Buzz Aldrin* hóast alt er. Tí hvat skal man sum høvundur stilla upp við ein høvuðspersón, sum vil gera alt fyri at sleppa undan at verða høvuðspersónur, og hvørs fremsta missión í lívinum er bara at vera eitt tannhjól í tí stóra maskinarínum? Heitið á skaldsøguni sipar nevniliga til Buzz Aldrin, sum var næsti maður at seta fótin á mánan eftir Louis Armstrong, og sum ongin tískil minnist. Sum tann ævigi tveyarin er Buzz Aldrin stóra fyrimyndin hjá Mattias, ið er sinnaður at gera alt fyri at ongin leggur merki til hann, ella fer at krevja nakað av honum.

### Herverk

Uttan samanbering annars, minnir prosjektið hjá Mattias eitt sindur um herverkið hjá Ole Jastrau á seg sjálvan í *Hærværk* eftir Tom Kristensen. Men meðan herverkið hjá Jastrau var stórbært og dramatiskt, dampar tað hjá Mattias bara spakuliga burtur í føroyska mjørkanum. Mattias er stutt sagt ov fittur og harmleysur, til at søgan kann fáa nakran brodd. Í staðin troyttast tú, tá Mattias framvegis á síðu 600 stendur á vippuni og hóttir við at leypa í okkurt slag av gloymskunnar havi. Tá tað umsíðir hendir, verður tað ein heldur patetisk lýsing av einum etandi fullum Mattiasi, sum sigur sítt kensluborna farvæl við Føroyar við at yvirtaka pallin og mikrofonina á Café Natúr og koyrir til Saksun, har hann grevur eitt minni um vinirnar niður á grøvini hjá vinkonuni Ennen.

### Happyville

Sum skaldsøga eydnast Buzz Aldrin best, har hon verður ein lýsing av Føroyum sum eitt limbo av lemjandi tvídráttinum ikki at tora at taka eina endaliga avgerð og ábyrgd á seg. Her koyra lýsingarnar av Føroyum, varda stovninum í Gjógv og støðugt ivandi høvuðspersóninum snotiliga við síðuna av hvørji aðrari. Tá haðrast leikar á, og støðan krevur av Mattias og teimum, at tey taka eina avgerð, velja tey at flýggja til Karibia, sum verður eitt slag av Happyville, har "sjálvt Havstein verður eitt lukkuligt menniskja, tí hann ikki longur hevur ábyrgdina av Mattias og hinum".

Sum frá líður flyta Mattias, føroyska dáman Eyðdis og sonurin Jákup til Stavanger, har tey búseta seg. Men tey sleppa ongantíð Føroyum heilt og ferðast javnan aftur, mest sum fyri at tryggja sær, at alt er, sum tað var. Og tað er tað stórt sæð. Treyðugt so, grannin hjá teimum í Gjógv, Óli, er fluttur til Havnar, men árabáturin hjá honum liggur framvegis við keiina, nakað tærður, men annars júst sum hann lá har fyri 20 árum síðani.

Og Mattias sjálvur røkkur sínum dreymi um at hvørva í mongdini. Hann finnur út av, at hann blunkar við eygunum 17.000 ferðir um døgnið, og sostatt livir ein stóran part av sínum lívi aftanfyri afturlatin eygu. Mattias er hann, "tú ikki varnast í køini aftanfyri teg í handlinum, ein av teimum 45 prosentunum, sum er samdur ella ósamdur í spurnarkanningini hesa vikuna um evni, tú ikki trúði, at nakar kannaði, sum situr í 37. bilinum á landavegnum á veg heim úr arbeiði" - eitt sindur sum Føroyar, prikkurin á heimskortinum, tú bara finnur, um tú veit, hvar hann er frammanundan.




## Kvinnulagnur við stíli

*Dorrit Willemsen, Den dag, jeg blev Honey Hotwing,*
*Gyldendal, 2005*

Dorrit Willumsen hátíðarheldur í hesum døgum síni 40 ár sum høvundur við útgávuni av stuttsøgusavninum *Den dag jeg blev Honey Hotwing.* Í nýggju stuttsøgum fáa vit søgurnar um nýggju einligar kvinnur og teirra tráanir. Men nei, lesarin kann ikki gita seg til restina. Tí sjálvt um kærleikin er kjarnin í teimum flestu av søgunum, fær hann hvørja ferð eitt heilt óvæntað skap. Og sjálvt um dreymarnir, sum standa hesum kvinnum í boði, eru teir vanligu, fær tráanin okkurt ekta og sorgblítt yvir sær. Við lyriskum flogi og blóðugum speisemi fær høvundurin sannført lesaran um, at dreymurin um at verða ein onnur, ikki er ein flýggjan, men sjálv drívmegin í at liva - eisini sjálvt um úrslitið er ein røð av stillum eksistensum, sum geva eina krúpandi kenslu av spiltum lívi.

Tað krevur ein høvunda av Willumsenskum formati at sigla í tíðarinnar vandasjógvi av beiskum og vónbrotnum kvinnum. Tí blíva søgurnar í *Den dag jeg blev Honey Hotwing* hvørki Bridget-Jones-hysteriskt stuttligar ella gamaltfeministiskt samfelagsrevsandi - og lesarin dregur líkasum andan lættari, saman við henni sjálvari, sum langtandi staðfestir "Onkuntíð hevði eg ynskt, at eg varð forelskað í einum astronauti. Vektleysur og hvítur sum ein eingil við innbygdum toiletti."!




**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**
Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent
FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo